KUNNGERÐ

viðv. Vestanstevnuhaldinum í Sørvági 13.-14. juli 1985

Leygardagin 13. juli 1985, hálvan tíma áðrenn kappróðurin byrjar og til hesin er liðugur, verður ikki loyvt óviðkomandi bátum og skipum at verta á kappróðrarøkinum.

Leygardagin 13. juli og sunnudagin 14. juli 1985 frá kl. 14.00 til næsta morgun kl. 06.00, er øll koyring frá »Blinttarminum« oman í bygdina bannað, líkasum øll koyring inn á Stoffabrekku frá Norðistovu oman ímóti dansistovuni verður bannað.

Í sama tíðarskeiði er parkeringsforboð á koyribreytini frá posthúsinum til »Blinttarmin«.

Hálvan tíma áðrenn kappróðurin byrjar og til hesin er liðugur, er ikki loyvt at koyra ella parkera frá húsinum hjá Hugo Fjørðoy og út á Bakka/kaiuna.

Parkeringsmøguleikar: Á Breiðagrasi, við fótbóltsvøllin, við skúlan, í grótbrotinum, úti á Bakka/kaiuni, við Føroya Banka, yvirav Sjóvinnubankanum og við missiónshúsið »Libanon«.

Sýslumaðurin í Vágum
Kári Thorsteinsson, fg.

Uratkvøða

Sum kunnugt verður skipað fyri eini uratkvøðu millum limir Føroya Fiskimannafelags um tað semingsuppskot, sum varð sett fram í sáttmálatrætuni við Føroya Reiðarafelag tann 28. juni.

Atkvøðurætt hava teir, sum hava goldið limagjald fyri 1984 og/ella 1985 og/ella sum eru mynstraðir uppá sáttmála millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag í 1985 og 1984.

Atkvøðuseðlar eru sendir út, og skulu teir verða felagnum í hendi aftur í seinasta lagi 31. juli. Er onkur við atkvøðurætti, sum av misgávum ikki hevur fingið atkvøðuseðil, verður viðkomandi biðin um at siga felagsskrivstovuni frá.

Limir umborð á skipum, sum eru burtur meðan atkvøðugreiðslan fer fram, fáa nærri boð frá felagnum um atkvøðugreiðslu umborð.

Eru annars ivamál verða limirnir bidnir um at venda sær til felagsskrivstovuna, tlf. 1. 1569.

Føroya Fiskimannafelag

ATAK

eitt gott tak

pf VESTMANNA TIMBURHANDIL

3860 Vestmanna . Telefon 24170

SUMMARFRÍ

Stongt verður frá 15. juli til 12. august 1985.

MATRIKULSTOVAN

Lastvognkoyring

Lastvognkoyring fast við at ringja til tlf. 1 7444.

Framhald av síðu 16

búgvandi harramenninir viðgyrdu seg í ófriðatíðum.

Men økið millum Passau og Wien, framvið Donau, verður eisini kallað Niebelungengau. Her var hetjukvæði um Burgendor-kongarnar, sum fullu á Húnalondum, yrkt á týskum máli, sama yrking, sum vit finna aftur í Edda, um Høgna, Brynhild og Regin smið.

Her í økinum kann ein eisini vitja slottið Artslotten, sum var ogn Franz Ferdinands, trúnfylgjara, og har hava hann og kona hansara fingið seinasta hvildarstað teirra, tó tey fullu fyri drápsmannahond í Zarajevo í 1914.

Í økinum framvið Donau, í Nieder- og Oberosterreich, verður nógv vín dyrkað. Tað er ein gomul tradition knýtt at hesum. Her kanst tú fara út til bøndirnar, sum eisini sjálvir hava loyvi til, ávísa tíð av árinum, at selja vín, »Heurigen« verður tað kallað, tað er: tað nýggja vínið, vínið frá í ár. Har sessast tú, úti í garðinum saman við øðrum turistum, sum eisini vitja, við bóndans borð, drekkur vín við ábiti og fær »Schrammel«-tónleik afturvið. Slikt kann ikki upplivast aðrastaðir.

Stødd so tætt við Wien er tað rimiligt at vit ikki fara heim aftur uttan at hava verið ein túr har eisini. Men vit fara ikki at møða okkum við at royna at røkka so nógv uppá ein dag. Vit vitja slottini Schonbrunn og Belvedere og teirra undurføgru parkir, og enda dagin við ta fara í Staatsoper, har vit skulu hoyra og siggja eina framførslu av vælkendu operettuni »Czardasfurstinn« av Emmerich Kalman.

Tað, sum her er nevnt, er bert hissini av øllum tí, sum upplivast kann á einum tilíkum túri. Men, skal túrurin verða ein uppliving, so má eitt sindur av fyrireiking til.

Heimferðina leggja vit um Keypmannahavn, við afturkomu til Føroyar olavsøkumorgun.

PARTAFELAGIÐ

FØROYA BANKI

3800 TÓRSHAVN

Mánaðarjavni pr. ultimo

JUNI 1985

OGN

			Kr.
*) Kassapeningur			20.502.909
Danmarks Nationalbank			199.038
Bankar og sparikassar innanlands			16.741.175
*) Bankar uttanlands			14.489.669
Lánsbrøv			413.565.320
Partabrøv			13.376.092
Av hesum egin partabrøv		31.200	
Útlán:			
Útlán við heimild til skiftandi nýtslu		968.242.590	
Vexlar		96.452.383	
Byggilán		217.418.765	
Óuppsigilig lán			
við fastari rentu	90.129		
Veðhaldslán	440.659.557	440.749.686	
Onnur útlán		271.370.905	1.994.234.329
Ábyrgdir			583.765.026
(Millum trygdir undir teim 2 seinastu upphæddunum eru egin partabrøv nom.·kr. 914.000)			
Fastar ognir			23.539.027
Innbúgv og boxrúm			2.261.801
*) Aðrir skuldarar			635.876
Kostnaður			32.736.569
*) Av hesum er ogn uttanlands kr. 19.149.889			3.116.046.831

SKULD

*) Innlán:		
við stytri uppsøgn enn 1 mánaða	621.685.034	
við uppsøgn frá 1 mánaða til stytri enn 12 mánaðar	17.288.821	
við uppsøgn frá 13 mánaðum og meira	1.213.012.587	1.851.986.442
Danmarks Nationalbank		130.000.000
Bankar og sparikassar innanlands		203.451.435
*) Bankar uttanlands		2.426.827
Ábyrgdir		583.765.026
*) Aðrir skuldarar		[illegible]
Rentur og provisjón		[illegible]
[illegible]		[illegible]
[illegible]		[illegible]
[illegible]		[illegible]
[illegible]		[illegible]
[illegible]		[illegible]

sosialurin telf. 11820